

## Liðið er úttikið

Høvuðsvenjararnir í føroysku svimjufeløgunum og starvsnevndin í Svimjisamband Føroya settu um vikuskifti navn á svimjararnar, sum skulu umboða Føroyar í landsdystinum móti Íslandi hin 9. oktober í ár.
Ymsar broytingar eru í hópinum, samanborið við landsdystin í fjør. Shaila millum Garðarnar og Pauli Ø. Mohr hava givið avboð, og aðrir svimjarar eru skaddir ella givnir. Kvinnurnar eru Guðrun Mortensen, Suðuroyar Svimjifelag, Turið S. Christiansen, Ægir, Birita Debes, FLOT, Tanja Skaalum, Suðuroyar Svimjifelag, Helena Sævarsdóttir, Suðuroyar Svimjifelag, Guðrun Holm Jacobsen, Havnar Svimjifelag, Astrið Foldarskað, FLOT, og Jonna B. Thomsen, Fuglafjarðar Svimjifelag. Menninir eru Pál Joensen, Suðuroyar Svimjifelag, Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, Bjarni M. Petersen, Ægir, Jón Hofgaard, Suðuroyar Svimjifelag, Dánjal Hestoy, Havnar Svimjifelag, Jóhann Heðinsson, Fuglafjarðar Svimjifelag, Eyðbjørn Joensen, Suðuroyar Svimjifelag, og Heðin L. Olsen, Ægir.

## Nýtt junior-met

Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, setti nýtt met í 400 metra blandað um vikuskiftið.
Tíðin var 4:42.49. Gamla metið var 4:48.41.
Tað boðar heimasíðan www.svimjing.com frá.



# GYLTA MÁLIÐ HJÁ DALBÚÐ

**Øssur Dalbúð syrgdi fyri, at EB/Streymur misti tvey sera týðandi stig í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Sundalagsmenn tóku ikki av møguleika at nærkast oddaliðnum, ÍF tók ikki av møguleikanum at hótta ovastu liðini, men NSÍ og HB frøddust um málið**

| | |
|---|---|
| ÍF | 3 |
| EB/STREYMUR | 3 |

Uni Holm Johannesen

Málið kom í 94. minutti.

Dánjal á Lakjuni sendi bóltin inn í brotsteigin, og ungi framherjin úr Runavík kom at standa millum fleiri mótstøðuleikarar. Hann tóktist ongantíð vera í iva. Hann smekkaði bóltin framvið René Torgarð.

3-3.

Eitt mál, sum oyðilegði veitsluna hjá EB/Streymi.

Sum úrslitini lagaðu seg um vikuskiftið, høvdu sundalagsmenn upplagdan møguleika at vinna seg nøkur týðandi fet inn á oddaliðið.

### Udsen í hopla

Daniel Udsen var stóri spælarin fríggjakvøldið.

Tvær ferðir sendi hann bóltin framvið Jákupi Mikkelsen í ÍF-málinum.

Danin, sum spældi sínar fyrstu landsdystir fyri Føroyar í mánaðinum, var ein støðug hóttan í løtum, tá EB/Streymi trýsti heimaliðið.

### Hvørgin hóttir

Øssur Dalbúð syrgdi fyri, at ÍF fekk eitt stig í heimadystinum.

Gleðin um málið er væl og virðiliga tvídeilt.

Framherjin syrgdi fyri, at EB/Streymur tók ikki av gylta møguleikanum at hótta ovastu liðini í deildini. Málið heldur fuglfirðingar inni í stríðnum um plássini, sum geva evropiska luttøku. Og málið var til stóra frøi hjá NSÍ og HB, sum ikki av álvara kenna seg hótt av hinum liðunum í løtuni.

## 5 stig til EB/Streym og 2 stig til ÍF

Aftaná teir tríggjar dystirnar millum ÍF og EB/Streym í vodofonedeildini í 2010 kunnu vit staðfesta, at EB/Streymur fekk væl meiri burtur úr hesum trimum dystunum. ÍF hevði heimavøll tvær ferðir ímóti EB/Streymi, og endaði tað við javnleiki í báðum førum. Í 2. umfari endaði tað við javnleiki 1-1, og í farnu viku endaði tað við javnleiki 3-3. Í 11. umfari hevði EB/Streymur heimavøll, og endaði tað við einum sannførandi 3-0 sigri til heimaliðið. Haraftrat vann EB/Streymur 1-0 ímóti ÍF í steypafinaluni, so tað hevur ikki eydnast ÍF at koppa EB/Streymi í fýra dystum, kappingarárið 2010.

HS